**Suðuroyar Sjúkrahús**
800  Tvøroyri
tlf. 34 33 00
Fyristøðukvinnan  tlf. 22 13 93

**4. juni 2015**

# *Vegleiðing í samband við andlát.*



***Suðuroyar Sjúkrahús***
*www.ssh.fo*

***Tá onkur í familjuni doyr, eru tað fleiri praktisk ting at taka sær av. Hetta skrivið er bert ein vegleiðing.***

Tygum skulu seta tygum í samband við fyristøðukvinnuna á sjúkrahúsinum á tlf: 34 33 00 lokal 3215 ella fartelefon 22 13 93.

**Kista fæst frá:**
Tróndur Nolsøe Tvøroyri tlf. 37 10 13 / 22 41 84
Prísur kr. 5.500,-.

Hans Jacobsen Tórshavn tlf. 31 16 90
Prísur: Føroysk kista frá kr. 5.062 til kr. 5.562,-
Donsk kista frá kr. 4.937,- til kr. 5.562,-

Herman Olsen tlf. 56 62 31
Prísur kr. 5.500,-

Sólsetur tlf. 35 36 37 / 299 000
Sí www.solsetur.fo

Sjúkrahúsið kann bíleggja kistu fyri tygum. Verður kistan bíløgd úr Havn, mugu tygum koyra hana av Krambatanga til sjúkrahúsið ella har farið verður frá.

Heilsutrygd rindar eftir umsókn, tó í mesta lagi kr. 5.000.

Umsókn og kvittan skulu sendast til:

Heilsutrygd
Stangavegur 53, 1. hædd
700 Klaksvík tlf. 61 40 00

heilsutrygd.fo

☐ **Líkklæðir:**
Líkklæðir fáast ókeypis frá Suðuroyar Sjúkrahúsi. Ynskja tygum, at tann deyðið skal í egin klæðir, eru tygum vælkomin at koma við klæðum.

☐ **Lýsing um andlát í útvarpi og bløðum:**
Vilja tygum lýsa andlátið, fráferðina úr kapellinum og jarðarferðina í útvarpinum ella bløðunum verður hetta fráboðað teimum.
Vanligt er at lýsa, tá tey nærmastu hava fingið boðini.

| | |
|---|---|
| Útvarpið tlf. 34 75 00 | andlat@kvf.fo |
| Sosialurin tlf. 34 18 00 | lysing@sosialurin.fo |
| Dimmalætting 79 02 00 | lysing@dimma.fo |

☐ **Fráferð úr kapellinum og jarðarferð:**
Tygum skulu tosa við prest ella onkran í samkomu tygara um fráferð úr kapellinum og jarðarferðina. Eisini kunnu tygum tosa um talu, ið skal haldast, sangir o.a., spyr prest um klokkara og organist.

☐ **Nær verður lagt í kistu:**
Sama dag, sum farið verður úr kapellinum, verður tann deyði lagdur í kistuna. Tygum kunnu vera við at leggja í kistuna, um tygum ynskja tað. Fyristøðukvinnan skal hava boð um, nær lokið skal leggjast á og nær farið verður úr kapellinum. Ynskja tygum at síggja tann, ið er deyður, er best at koma um dagin. Sigið fyristøðukvinnuni frá, áðrenn tygum koma.

☐ **Børubukett:**
Børubukett verður bíløgd av tygum. Sig blómuhandlinum frá nær kistan fer úr kapellinum.

☐ **Líkbilur:**
Líkbilur skal bíleggjast at koyra úr kapellinum og til jarðarferðina.
Líkbilurin hjá Tvøroyrar Býráð kann bíleggjast á tlf. 57 99 26 ella 26 44 76. Kommunurnar gjalda líkbilin.

☐ **Berarar:**
Vanligt er, at 6 berar eru til kistuna, uttan so at onnur avtala er gjørd, tá kistan er bíløgd.

☐ **Gravari:**
Setið tygum í samband við gravaran so skjótt sum til ber. Er kistan longri alla breiðari enn vanligt, skal gravarin hava boð um hetta.
Kommunan vísir á, hvør gravarin er.

☐ **Sangarar:**
Í kirkjum og samkomun eru sangarar.
Tygum mugu spyrja tygum fyri har, hvørjir hesir eru og síðan seta tygum í samband við teir.

☐ **Erv:**
Erv er tað nøkur sum halda í heiminum hjá tí, ið er deyður, hjá avvarðandi, á matstovum ella í bygdar-& samkomuhúsum.